# ítróttur

Nr. 57 • leygardagur • 22. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyingar rógva í Hetlandi

**Vikuskiftið 29. og 30. mars skipar Eide Rowing Club í Hetlandi fyri innandura rógvikapping. Fleiri av limunum í felagnum vóru í Føroyum í fjør, og tey ynskja, at síggja fleiri føroyingar til kappingina**

CONCEPT 2
*Solby A. Eliasen*

Kappingin í Hetlandi verður skipað á sama hátt sum flestu tílíkar kappingar, men tað høvdu bert einir 12 luttakarar teknað seg til, tá Sosialurin tosaði við Ian Davidge úr Hetlandi. So hann segði, at tað helst ikki fara at verða nakrir bólkar at rógva í.

– Raðfylgjan verður meira tilvildarlig, sigur Ian. Hann greiðir frá, at róð verður leygardag, og tá kappingin er av, verður skipað fyri einum hugnakvøldi við døgurða, dansi og undirhaldi.

Í Eide Rowing Club hava tey fýra rógvimaskinur av slagnum Concept 2, sum er tað merki, sum flest øll róðrarfeløg herheima hava útvegað sær at venja á, inntil tíð er at fara í bátarnar.

Og tann 29. mars skipa tey so fyri eini innandurakapping.

Fleiri av limunum í Eide Rowing Club vóru í Føroyum í august mánaði í fjør, tá bátastevna var í Suðuroy. Tá luttóku tey í kappróðrunum, sum vóru tá. Og tá vóru vinarbond knýtt, og tey vilja hetlendingar fegnir varðveita, so tí heita tey á føroyingar, sum hava hug at royna seg í teirra kapping um eina viku um at koma við.

– Tað verður frítt at gista og eta, so tey skulu einans gjalda ferðaseðilin, sigur Ian Davidge úr Hetlandi.

Sosialurin hevur tosað við onkran av føroysku rógvarunum, sum hava ætlanir at fara niður at rógva. Og tey siga, at tey frættu um hesa kappingina frá vinfólkum, sum Ian Davidge hevur í Føroyum.

– Vit hildu tað ljóðaði sera áhugavert, og tí hava vit hug at fara at royna okkum. Eisini kenna vit fleiri av rógvarunum hjá Eide Rowing Club frá tí tey vóru her, greiðir ein av rógvarunum frá.

Sum skilst so eru tað einir fýra ella seks føroyingar, sum fara til Hetlands.

### Stevna í august

Men hetlendingar rógva ikki bara á landi. Í august á ár skipa tey fyri róðrarstevnu aftur. Og tá tey vóru í Føroyum bjóðaðu tey føroyingum at koma niður í august í ár at rógva. Talan er tá um ein túr, sum kemur at vara einar átta dagar, har róð verður fleiri ferðir. Millum annað er ein teinum upp á sjey míl, sum skal rógvast. Tá kunnu allir bátar luttaka. Men tað verða eisini róðrar, har rógvarnir og bátarnir verða býtt upp, sum vit eru von við her í Føroyum.

Ian Davidge sigur, at hann vónar, at tað koma nøkur tíggjumannafør, serliga, niður tá, tí Eide Rowing Club eigur eitt gamalt føroyskt tíggjumannafar. og heldur hann, at tað hevði verið stuttligt at kunnað róð við tí móti føroyingum. Men hann leggur aftur at, at tað sjálvandi ber til at leiga ein bát har niðri, um tað ikki ber til at hava føroysku bátarnar við.

– Men so verður tað ikki føroyskir bátar, sigur hann.

Ian vónar at síggja nógvar føroyingar nú til innandura kappingina, men sanniliga eisini í august.

– Free food and accomadation, so just get on the boat!! sigur Ian at enda.



*Hetlendingar bjóða áhugaðum føroyingum at verða hjartaliga vælkomnum niður til Hetlands at rógva á Concept 2 maskinum 29. mars*

## KÍF verður verðandi

Mikukvølidð varð dysturin um upp- og niðurflyting ímillum tær báðar bestu kvinnudeildirnar í flogbólti leiktur. Dysturin stóð ímillum KÍF og SÍ, og ein stór áskoðarafjøld gjørdist her vitni til ein sera spennandi dyst, har tað at enda eydnaðist KÍF at tryggja sær eitt ár afturat í bestu deildini.

Fimm sett máttu til, áðrenn ein vinnari varð funnin. KÍF tók sær av fyrsta settinum við 25-20, men tá SÍ vann sannførandi 25-19 í næsta settinum stóð greitt, at her fór at gerast sera javnt. Tað bragdaði aftur hjá kollfirðingum, sum vunnu triðja settið 25-18, men tá SÍ so svraði aftur við heili 25-16, noyddist javnbrótari til. Her vóru tær úr KÍF tær kaldaru, og við settúrslitinum 15-11 tryggjaðu tær sær rættin til enn eitt ár í bestu deildini.

Hjá monnunum var samstundis dystur um seinasta plássið í næst bestu deildini. Her stóð dysturin millum SÍ og Fram, og vann SÍ hendan dystin 3-1. Settúrslitini vóru her 25-20, 18-25, 25-17 og 25-20.

**jm**



# Nú telur av álvara niður

**Fýra dystir eru eftir at leika í bestu kvinnudeildini, og fyri hvørt umfarið kemur gullið hjá VB-kvinnunum alsamt nærri**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir javnleikin í Vestmanna seinasta vikuskifti, munnu sjálvt mest svartskygdu vágbingarnir hava tveitt allan iva til viks. Tó at tað enn resta fýra dystir at spæla, og tó at VB skal hava fimm stig í hesum, so man tað nú standa øllum greitt, at her er talan um komandi meistaraliðið.

Níggjundi dysturin í endaspælinum verður á heimavølli móti Kyndli sunnudagin, og einki er at ivast í, at tað verður stúgvandi fult av fólki, sum fer at stuðla heimaliðnum.

Og tað er illa hugsandi, at Kyndil kann gera nakað sum helst fyri at steðga sigursgongdini hjá VB. Sæð burtur frá dystinum í Havn í grundspælinum, so hevur VB vunnið trygt á teimum grønu í hinum uppgerðunum, og ikki minst soleiðis sum spælið hjá VB hevur verið í endaspælinum, vil alt annað enn ein tryggur heimasigur vera ein sensatión av teimum stóru.

### Næstu plássini

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir um vikuskiftið. Í Havn skal Neistin gera eina roynd at toga seg upp móti teimum liðunum, sum stríðast um bronsuna. Her hevur StÍF – sum annars hevur frí hesaferð - tikið eina kanska avgerandi leiðslu, men enn kunnu tær snáva, og so ræður um hjá næstu liðunum at vera til reiðar.

Hesi eru í løtuni Stjørnan og Kyndil. Kyndil fer ivaleyst at missa eitt fet í so máta sunnudagin, og so er tað upp til Neistan at gera av, um hetta eisini skal henda fyri Stjørnuna. Hendir tað, so er Neistin eftir eitt mest sum miseydnað kappingarár aftur við í spælinum um heiðursmerki. Ikki minst tí tær eisini hava dystir móti bæði StÍF og Kyndli eftir.

Seinasti dysturin verður í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti Tjaldri. Tað er lítið at ivast í, at vónbrotið í Vestmanna er stórt, nú tað er greitt, at tað ikki verður nøkur endurtøka av meistaraheitinum, men hinvegin eiga tær at kunna sveiggja seg somikið upp, at tað verður til sigur á Tjaldrinum, sum í løtuni bert bíðar eftir, hvussu næst besta deildini háttar sær. Eitt spæl, sum fer at gera av, hvørt liðið við møguligum upp- og niðurflytingardysti kortini kann varðveita sessin í deildini.



*Sjálvt mest svartskygdu vágbingarnir mugu nú ásanna, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn FM-heitið er veruleiki, og sunnudagin kunnu kvinnurnar koma enn eitt stig á leiðini, tá Kyndil kemur á vitjan*

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 8 | 7 - 1 - 0 | 521 | 422 | 99 | 24 |
| 2 | VÍF | 8 | 5 - 2 - 1 | 465 | 389 | 76 | 20 |
| 3 | StÍF | 8 | 4 - 1 - 3 | 476 | 489 | -13 | 15 |
| 4 | Stjørnan | 8 | 2 - 1 - 5 | 429 | 431 | -2 | 13 |
| 5 | Kyndil | 8 | 3 - 1 - 4 | 484 | 494 | -10 | 13 |
| 6 | Neistin | 8 | 3 - 0 - 5 | 409 | 440 | -31 | 11 |
| 7 | Tjaldur | 8 | 1 - 0 - 7 | 385 | 504 | -119 | 3 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 626 | 530 | 96 | 19 |
| 2 | StÍF | 7 | 4 - 2 - 1 | 541 | 475 | 66 | 19 |
| 3 | Neistin | 9 | 4 - 1 - 4 | 598 | 565 | 33 | 18 |
| 4 | Kyndil | 8 | 5 - 2 - 1 | 548 | 530 | 18 | 18 |
| 5 | KÍF | 8 | 2 - 2 - 4 | 537 | 557 | -20 | 11 |
| 6 | H71 | 8 | 4 - 0 - 4 | 517 | 585 | -68 | 11 |
| 7 | Tjaldur | 8 | 0 - 1 - 7 | 498 | 623 | -125 | 4 |

## Máltindarnir

### Kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 161 | (43) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 159 | (41) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 144 | (39) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 137 | (44) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 132 | (42) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 131 | (18) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (64) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 118 | (24) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 107 | (30) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 104 | (6) |
| Alina Olaru | StÍF | 101 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 84 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 84 | (7) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 78 | (13) |
| Laila Jespersen | VB | 62 | |

### Menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 183 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 162 | (34) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 137 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 135 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 127 | (9) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 127 | (26) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 118 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 112 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 109 | (22) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 96 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 92 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 91 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 89 | (27) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 80 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 77 | |

# Argandi útidystir

**Bæði oddaliðini í mansdeildini skulu royna seg móti liðum, sum á pappírinum er veikari, men sum tó bæði kunnu arga, tá lagið er hitt rætta**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tvinnir dystir verða í bestu deildini í manshondbólti um vikuskiftið. Í báðum førum er annað av oddaliðunum, StÍF og VÍF, á útivølli móti liðum, sum á pappírinum mugu metast sum verandi veikari, men hinvegin er als ikki víst, at talan fyri tað verður um nakra lætta uppgávu.

### Kunnu arga

Eitt skifti í endaspælinum gjørdu hoyvíkingar somikið nógv um seg, at liðið førkaði seg úr einum botnsessi til at gerast nakað, sum líktist einum bronsubiðli, men síðani tá er tó nakað av stígi komið í aftur, og tí er einki at ivast í, at strandingar eru stórfavorittar undan dystinum leygardagin.

Undir upptúrinum vóru strandingar einasta av oddaliðunum, sum hoyvíkingar ikki megnaðu at basa, men tað var tó nær við. Bert eitt mál í evstu løtu í dystinum á Skála tryggjaði StÍF sigurin, og tí er als ikki óhugsandi, at hoyvíkingarnir kunnu arga hesaferð.

Hinvegin fara strandingar helst at vara seg fyri nakað slag av undirmetan av mótstøðuni. Eftir tapið fyri Kyndli stendur fullkomuliga greitt, at nú eru ikki ráð at missa meira. Bæði VÍF og Kyndil andað meira enn heitt í nakkan á StÍF, og tí er tað bert sigurin, sum telir.

Tað er eisini útgangsstøði hjá VÍF, sum eisini fer á vitjan í Hoyvíkarhøllini sunnudagin. Og tað man í øllum førum vera víst, at VÍF so heldur ikki fer at undirmeta mótstøðuna, tá spælt verður í Hoyvíkarhøllini. Her hevur VÍF vitjað tríggjar ferðir í ár, og bert tað einu ferðina – í grundspælinum móti H71 – hevur hetta borið úrtøku við sær. Hinar báðar ferðirnar hevur talan verið um sannførandi sigrar til heimaliðið, og ivaleyst verður tað ein endurtøka av hesum, sum KÍF fer eftir.

Hjá VÍF er tó eingin bøn. Eftir at teir taptu fyri Kyndli, tóktust teir annars vera úti av gullstríðnum, men sigurin hjá Kyndli broytti aftur støðuna, soleiðis at teir nú aftur sjálvir eru harrar yvir egnari lagnu. Hetta krevur tó fýra sigrar á rað í seinastu dystunum, tí í øllum førum kunnu teir ikki spæla uppá, at StÍF fer at missa nakað sum helst.



*Vestmenningar taptu greitt, tá teir í grundspælinum vitjaðu KÍF. Tað eru ráðini ikki til hesaferð, um meistararnir framvegis skulu halda fast í strandingum*